Mars 2019

# Bátatrygging

## *Skjal við upplýsingum um skrokktryggingina fyri bátar (hereftir bátatryggingin).*

Hendan kunningin veitir ikki allar upplýsingar um Bátatryggingina. Tá skaði er, eru tað fullfíggjaðu tryggingartreytirnar og tryggingarskjalið, sum eru galdandi. Tú finnur nýggjastu tryggingartreytirnar á heimasíðu okkara www.betri.fo
Tú ert eisini vælkomin at seta teg í samband við okkum á tel 348 600 og fáa nærri ráðgeving.

### Hvat slag av trygging er talan um?

Bátatryggingin er ein grundleggjandi trygging, sum fevnir um ávísar skaðar á bátin, maskinuna og skaðar, sum tú gert á bát hjá øðrum. Afturat grundleggjandi tryggingini kanst tú tekna hópin av tilvalum, so tryggingin hóskar júst til tín tørv.

### Hvat dekkar tryggingin?

Bátatryggingin dekkar skaðar, sum standast av brádligum og óvæntaðum hendingum – til dømis sjóskaðar, illveðursskaðar og skaðar, ið koma av herverki.

Hon dekkar skaðar á skrokk, elektriskan útbúnað, radiotól, nautisk tól, lívbátar, eykalutir og aðrar lutir, ið ikki skulu brúkast upp umborð, umframt búnaðarlutir og føst fiskiamboð –undantikið snellur. Tryggingin fevnir eisini um ávísar skaðar á maskinuna, sum koma uttanífrá, og um tú siglir á annan bát og gert skaða.

Um fullur skaði er, verður endurgjaldið grundað á avtalaða tryggingarvirðið á bátinum.

#### Dekningar:

- ✓ Skaði av brádligari og óvæntaðari hending
- ✓ Skaði á presending
- ✓ Ávísir skaðar á maskinu, leysamotor, uttanborðadrev og spøl
- ✓ Ábyrgd fyri samanstoyt
- ✓ Fult endurgjald, um báturin gerst vrak
- ✓ Skaði, meðan báturin stendur á landi
- ✓ Skaði undir flutningi innanoyggja
- ✓ Samsýning fyri hjálparveiting
- ✓ Samsýning fyri kavarahjálp
- ✓ Rættarhjálp
- ✓ Sálarfrøðilig hjálp
- ✓ Sigling í Norðurlondum og Stórabretlandi í upp til 60 dagar (ásetta siglingarleiðin)

#### Tú kanst eisini velja:

- ✓ Maskintrygging
- ✓ Ábyrgdartrygging
- ✓ Snellutrygging
- ✓ Arbeiðsskaðatrygging
- ✓ Veiða og útgerð
- ✓ Manningarognir
- ✓ Skrokkinteressa
- ✓ Víðkað siglingarleið
- ✓ Flutningstrygging millum lond

Gev gætur, at sjálvsábyrgdir og frádráttir kunnu verða ásett í sambandi við tilvalini.

### Hvat dekkar hon ikki?

Her eru nøkur dømi um skaðar, sum grundleggjandi bátatryggingin ikki dekkar. Listin er ikki fullfíggjaður. Fullfíggjaða listan sært tú í tryggingartreytunum.

- x Skaði av hending, ið ikki var brádlig og óvæntað
- x Skaði av sliti, aldri og vanligari nýtslu
- x Skaði av, at báturin var vanrøktur, ikki sjódyggur, ikki nøktandi útgjørdur ella mannaður
- x Skaði hendur í grind
- x Skaði hendur, meðan báturin varð nýttur til ólógligt endamál
- x Skaði í sambandi við sleip, sum ikki er orsakað av skaða
- x Skaði gjørdur við vilja ella undir ávirkan av rúsdrekka ella rúsevnum
- x Útreiðslur fyri tíðartap, ferðaútreiðslur, hýru og kostpengar

### Eru avmarkingar í dekningum?

Endurgjald fyri skaðar er altíð avmarkað til tryggingarvirðið á tínum báti. Gert tú skaða á annan bát, er endurgjaldið fyri skaðan á hin bátin eisini avmarkað til tryggingarvirðið á tínum báti.

Í sambandi við ábyrgdarskaðar kann samlaða endurgjaldsskyldan hjá tryggingini sostatt vera upp til tvær ferðir tryggingarvirðið á tínum báti: Endurgjaldið til tín fyri skaðan á tín bát – og endurgjaldið til hin bátaeigaran fyri skaðan á hansara bát.

**Betri Trygging P/F** Kongabrúgvin, postsmoga 329, 110 Tórshavn
Tel +298 348 600, betri@trygging.fo, www.betri.fo

## Sjálvsábyrgd

Sjálvsábyrgdin verður avtalað, tá tryggingin verður stovnað. Støddin á sjálvsábyrgdini er tengd at tryggingargjaldinum. Sjálvsábyrgd verður drigin frá endurgjaldinum í øllum skaðum, eisini ábyrgdarskaðum – tó er ikki sjálvsábyrgd á samsýningini fyri sleip og kavarahjálp.

Afturat sjálvsábyrgdini verður serligur frádráttur gjørdur í endurgjaldinum fyri ávísar skaðar – her eru nøkur dømi um, nær frádráttur verður gjørdur. Listin er ikki fullfíggjaður.

- Skaði á presending
- Skaði á radiotól
- Skaði á nautisk tól
- Skaði á leysamotor
- Skaði á uttanborðadrev
- Skaði á IPS skipanir, Waterjet og líknandi skipanir

## Hvar dekkar tryggingin?

Tá ið tú teknar tryggingina, gert tú av, hvørji landafrøðilig øki og hvørjar siglingarleiðir tryggingin skal fevna um. Í tryggingar-skjalinum sært tú, hvar hon dekkar.

Bátatryggingin er galdandi undir sigling í Norðurlondum og Stórabretlandi í upp til 60 dagar uttan fráboðan.

## Hvørjar skyldur havi eg?

**Tá ið skaði hendir:**

- Boða okkum frá beinanvegin á appini »Mín trygging«, www.trygging.fo ella á tel. 348 600
- Royn við tað sama at avmarka skaðan
- Set teg í samband við okkum, áðrenn umvæling verður framd, uttan so at tað er bráðneyðugt at umvæla ella flyta skadda lutin.
- Savna allar upplýsingar og prógv, ið kunnu hava týdning fyri okkum
- Tjóvarí- og herverksskaðar skulu meldast til løgregluna
- Ikki viðurkenna ábyrgd mótvegis triðjamanni uttan loyvi frá okkum
- Boða frá skaðanum í mesta lagi 6 mánaðir eftir skaðahendingina
- Um neyðugt skulu tryggingartakari og skipari geva sjófrágreiðing eftir reglunum í sjólógini

**Boða okkum frá:**

- Um tú broytir bústað, telefonnummar, teldupost ella líknandi
- Um broytingar eru í bátinum ella hvussu tú nýtir bátin
- Um báturin verður brúktur uttanlands fleiri enn 60 dagar
- Um broytingar eru í ognarviðurskiftunum

## Nær og hvar gjaldi eg?

Tú kanst gjalda árliga ella mánaðarliga. Gjaldast kann um sjálvvirkandi gjaldstænastu.

## Tryggingartíðarskeið

Tryggingin er galdandi frá stovningardegnum og verður endurnýggjað árliga.

Tryggingargjaldið verður prístalsjavnað árliga við brúkaraprístalinum hjá Hagstovu Føroya, tó í minsta lagi 1 prosent í mun til árið fyri.

## Hvussu sigi eg avtaluna upp?

Tryggingin kann sigast upp av báðum pørtum við freist á ein mánað.

Tryggingin kann eisini verða uppsøgd av báðum pørtum í sambandi við at skaði er endurgoldin ella avvístur.